## Portsmouth kann missa streymin

Enska felagið Portsmouth er í stórum fíggjaligum trupulleikum. Fleiri ferðir í hesum kappingarárinum hevur lønin til spælararnar verið seinkað, og nú kann felagið missa streymin á venjingarvøllinum hjá sær. Orsøkin er, at Portsmouth skyldar eina stóra rokning fyri streymnýtslu, og nú hevur elfelagið hótt við at kvetta streymin til venjingarvøllin Wellington í dag sum ein annan dag.



## Juve lúrir eftir Skrtel

News of the World skrivaði í gjár, at italska felagið Juventus er sinnað at leggja einar 70 milliónir krónur á borðið fyri at fáa verjuspælaran Martin Skrtel til felagið í summar. Skrtel, sum er ættaður úr Slovakia, er sáttmálabundin við Liverpool. Juventus ætlar, at Skrtel skal avloysa Fabio Cannavaro, sum er komin væl upp í árini sum fótbóltsspælari.

### StÍF-Neistin 21-31 (10-12):

# Støddfrøðin næstan upp á pláss

**Neistin hevur nú við mest sum matematiskari vissu spælt seg í FM-finaluna, men á Skála tók tað nakað av tí, áðrenn teir bláu fingu lagt StÍF niður**




Jákup Mørk



Tað er nú bara heilt langt úti í teoriini, at møguleiki fyri eini FM-finalu uttan Neistan er til staðar

Mynd: Álvur Haraldsen

Síðani venjaraskiftið herfyri tykist StÍF vera í ferð við at reisa seg úr øskuni, sum liðið hevur verið í seinastu mánaðirnar.

Seinasti sigurin skal framvegis finnast í november mánaði, men avrikini seinastu dystirnar hava víst eitt lið, sum er ført fyri at taka dystin upp við hini.

Og tað slapp Neistin eisini at kenna stóran part av dystinum á Skála sunnudagin. Hóast sigurin at enda gjørdist rættiliga sannførandi, so var tað ikki fyrr enn seinastu 10 minuttirnar, at tað veruliga skrædnaði. Fram til tá hevði munurin støðugt verið eitt og tvey mál, og hóast strandingar bert tvær ferðir í øllum dystinum komu upp á javnt, hildu teir alla tíðina stutt tjóður í mótstøðuni.

Breiddin í hópinum hjá Neistanum er tó stór, og tí ber til hjá liðnum støðugt at skifta út, samstundis sum klassaspælarar eru á mest sum øllum plássum.

Tað gav at bíta móti dystarenda, tá orkan hjá strandingum ikki helt til meira av trýstinum. Neistin vann seinastu 10 minuttirnar við 9-2, og so er møguleikin á heilt teoretiskum støði, um Neistin ikki skal tryggja sær atgongd til FM-finaluna.

Strandingar eru hinvegin framvegis bara eitt stig oman fyri niðurflytingarplássið. Ein lagna, sum ikki hóvar siðvandu hondbóltsbygdini serliga væl, og tað verður fyrst og fremst hetta, ið sleppast skal undan komandi dystirnar.

**FAKTA**

**StÍF-Neistin 21-31 (10-12)**
**10 min:** 2-6
**20 min:** 6-7
**40 min:** 15-17
**50 min:** 19-23
**Málskjúttar**
**StÍF:** Marius Joensen 5, Borgar Danielsen 5(2), Suni Ernstsson 4, Bárður B. Danielsen 3, Jóanes Prestá 2, Cristian Preda 2
Neistin: David Edvardsen 13(1), Finnur Hansson 5, Jákup Apol Hentze 4, Sjúrður Thomassen 3, Ingi Olsen 3, Kristian Dulavík 2, Karl Oddmar Rasmussen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, Neistin 2
**Útvísingar:** StÍF 3, Neistin 2
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason

### Tjaldur-VÍF 32-23 (20-14):

# Trygt hjá Tjaldri

**Tjaldur sýndi onga náði, tá tær hovdu vitjan av VÍF**




Jákup Mørk

Eins og Stjørnan ger tað, so hevur Tjaldur ongar sum helst trupulleikar av liðunum, sum liggja frá triðja til sætta pláss í Susnet-deildini.

Í gjár vitjaði VÍF í Runavík, og her var ongan tíð nakar ivi um, hvønn veg stigini skuldu fara.

Gestirnir, sum fyrireika seg til steypafinaluna móti Stjørnuni, sluppu at fylgja við fyrsta korterið av dystinum, men eftir hetta leyp Tjaldur avstað. Sum ikki eina ferð vóru tað tær báðar, Adina Petrea og Cornelia Rimbu, sum løgdu mest fyri í málskjótingini. Men eisini er Alina Olaru Anghel spakuliga við at koma í røttu venjingarstøðuna, og tað er eingin ivi um, at hon kann gerast ein týðandi brikkur, tá FM-finalurnar verða spældar.

Hjá VÍF hevur gingist væl seinnu umførini, og hóast Stjørnan og Tjaldur hava verið nakað stórir bitar, so er eingin ivi um, at spæligleðin á liðnum í løtuni er í toppi.

Komandi tveir dystirnar skulu tær gulu royna seg móti Neistanum og StÍF, og eingin ivi er um, at hetta eru tveir dystir, sum liðið ætlar at brúka til at lyfta seg heilt úr niðurflytingarvandanum, áðrenn spenningurin verður ov stórur undan seinastu umførunum.

**FAKTA**

**Tjaldur-VÍF 32-23 (20-14)**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 13-9
**40 min:** 23-17
**50 min:** 28-21
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 9, Cornelia Rimbu 9(3), Alina Olaru Anghel 4, Jóhanna í Króki 3, Annika Thomsen 2, Mary-Ann Zachariassen 2, Benedikta Johannesen 1, Heidi Sevdal 1, Heidi á Lakjuni 1
**VÍF:** Liljan Djurhuus 8(1), Tóra Seloy 5, Finngerð Jensen 3, Agnas Olsen 2, Heidi Joensen 2(1), Jóhanna Gunnlaugsdóttir 1, Elisa Leo 1, Halla Midjord 1
**Brotskøst:** Tjaldur 4, VÍF 3
**Útvísingar:** Tjaldur 2, VÍF 2
**Dómarar:** Tummas Juul Thomsen & Magnus í Króki